## Danska superligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 14 | 9 - 3 - 2 | 25 | 15 | 10 | 30 |
| 2 | Esbjerg | 14 | 6 - 4 - 4 | 30 | 26 | 4 | 22 |
| 3 | AaB | 14 | 7 - 1 - 6 | 21 | 20 | 1 | 22 |
| 4 | Brøndby (M) | 14 | 6 - 3 - 5 | 25 | 17 | 8 | 21 |
| 5 | Farum | 14 | 7 - 0 - 7 | 18 | 21 | -3 | 21 |
| 6 | FCM | 14 | 5 - 4 - 5 | 21 | 19 | 2 | 19 |
| 7 | OB (S) | 14 | 5 - 3 - 6 | 20 | 18 | 2 | 18 |
| 8 | AGF | 14 | 5 - 3 - 6 | 20 | 24 | -4 | 18 |
| 9 | Silkeborg | 14 | 4 - 4 - 6 | 17 | 19 | -2 | 16 |
| 10 | Køge | 14 | 5 - 1 - 8 | 22 | 32 | -10 | 16 |
| 11 | AB | 14 | 3 - 6 - 5 | 15 | 18 | -3 | 15 |
| 12 | Viborg | 14 | 3 - 6 - 5 | 21 | 26 | -5 | 15 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

## Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herfølge | 14 | 10- 1 - 3 | 34 | 20 | 14 | 31 |
| 2 | Randers F. | 14 | 9 - 1 - 4 | 32 | 19 | 13 | 28 |
| 3 | Frem | 14 | 8 - 3 - 3 | 34 | 22 | 12 | 27 |
| 4 | Skjold | 14 | 8 - 2 - 4 | 29 | 14 | 15 | 26 |
| 5 | Vejle | 14 | 7 - 3 - 4 | 22 | 20 | 2 | 24 |
| 6 | HFK Sønderj. | 14 | 6 - 4 - 4 | 31 | 25 | 6 | 22 |
| 7 | Fredericia | 14 | 6 - 4 - 4 | 21 | 15 | 6 | 22 |
| 8 | Ølstykke | 14 | 6 - 4 - 4 | 32 | 29 | 3 | 22 |
| 9 | B 1913 | 14 | 5 - 3 - 6 | 20 | 26 | -6 | 18 |
| 10 | FC Aarhus | 13 | 5 - 1 - 7 | 23 | 23 | 0 | 16 |
| 11 | Brønshøj | 14 | 4 - 4 - 6 | 16 | 20 | -4 | 16 |
| 12 | AC Horsens | 13 | 4 - 3 - 6 | 20 | 23 | -3 | 15 |
| 13 | B93 | 14 | 4 - 2 - 8 | 20 | 26 | -6 | 14 |
| 14 | Hvidovre | 14 | 3 - 3 - 8 | 15 | 31 | -16 | 12 |
| 15 | B 1909 | 14 | 2 - 4 - 8 | 23 | 34 | -11 | 10 |
| 16 | HIK | 14 | 2 - 2 -10 | 13 | 38 | -25 | 8 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja)

# Fólkið hjá Brøndby er ov ungt

**Nýggja felagið hjá Jón Róa Jacobsen hevði í Århus seks spælarar á liðnum, sum eru 22 ár og yngri, og tað varð mett at vera ov mikið**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað gongst einki serligt hjá Brøndby, sum er nýggja føroyska felagið í superliguni. Leygardagin vóru teir í Århus, har heimaliðið, sum hevur skinklað nógv seinasta mánaðin, vann 2–1. Tað var málleyst, inntil eitt korter var eftir. So fekk meginparturin av teimum 12.535 áskoðarunum nakað at fegnast um. Tom Christensen stútaði heimaliðið framum, og fimm minuttir fyri leiklok skoraði Mortan Poulsen til 2–0, eftir at veteranurin í Brøndby málinum, Mogens Krogh, hevði tveitt bóltin út til hansara. Í síðstu løtu minkaði verjuspælarin, Per Nielsen, um munin.

Nú hevur Michael Laudrup verið venjari í Brøndby í 100 dagar. Í politikki plaga teir at meta um avrikini, tá ið nýggj stjórn hevur sitið við valdinum í 100 dagar. Í Danmark meta fjølmiðlarnir í hesum døgum um avrikið hjá kendasta danska fótbóltsspælaranum nakrantíð, nú hann hevur verið venjari í 100 dagar. Hóast Brøndby er á fjórða plássinum, so verður ikki mett, at Brøndby hevur verið sannførandi, og tað eru teir, sum meta, at um ikki talan var um júst Michael Laudrup, so hevði hann verið evni at fáa sekkin.

Men aðrir vísa á, at Laudrup er við at byggja nýtt lið í Brøndby, og at tað krevur sína tíð. Leygardagin vóru seks spælarar á Brøndby liðnum í Århus, sum eru 22 ár og yngri. Tað varð mett, at ov nógvir vóru ov moyrir. Kanska ikki bestu fyritreytirnar hjá Jón Róa Jacobsen at sleppa upp í part, tí hann er jú bara 19 ára gamal, men tað man vera lítið at ivast í, at HB leigusveinurin í Brøndby fer at fáa møguleikan.

Hesa ferð var Michael Laudrup serliga misnøgdur við álopspartin, sum hann ikki helt hava verið nóg hvassan. Hann metti tað vera ov vánaligt, at tað bara var ein verjuspælari, sum megnaði at skora.

### Fjarstøðan vaks

Sannførandi FCK sigurin í Parkini gjørdist eyka kærkomin hjá Toda Jónsson og teimum, tí umframt heilkiksarin hjá Brøndby, so meiri enn hálvkiksaði Esbjerg, sum hevur verið næstfremst.

Esbjerg hevði vitjan av Silkeborg, sum Viggo Jensen venur. Hann var venjari í Esbjerg undan summarsteðginum. Heimaliðið legði seg á odda, og teir sendu tríggjar ferðir í stólpan. Men tað eydnaðist Silkeborg at javna til 1–1.

AaB hevði tapt tríggjar teir seinastu heimadystirnar, tá ið teir fóru á heimavøllin ímóti OB. AaB vann 2–1. Tá ið eitt korter var farið, misnýttu teir brotsspark, men eitt korter seinni skoraði Stefan Bidstrup. OB málverjin Karim Zaza, sum fyrr í heyst var kosin at vera tann besti í superliguni, varð útvístur eftir málið. Hann var í øðini og fekk fyrst gult kort fyri at rópa ókvæmisorð eftir dómaranum. So skýrdi hann annan hjálpardómaran at vera idiot, og so sá hann reytt. OB venjarin var í øðini inn á atburðin hjá málverjanum. Men upptøkurnar vístu, hví málverjin var so illur. Áðrenn bólturin fór í málið, nært hann einum av AaB spælarunum, sum var rangstaddur.

Hóast OB síðsta tíman var undirmannað, so megnaðu teir í 66. minutti eftir verjukiks at javna til 1–1. Eitt korter undan leikloki skoraði AaB sigursmálið, eftir at eykamálverjin ikki hevði megnað at hildið langskotsroynd.

### Botnurin líkist sær sjálvum

FCM var hóskvøldið í Brússel, har teir í UEFA Cup taptu 3–1 ímóti Anderlecht. Teir í FCM vóru vónsviknir, tí teir misnýttu upplagdar møguleikar.

Sunnudagin hevði FCM í Ikast vitjan av Køge. Uppflytararnir hava higartil staðið seg eina best av øllum á útivølli, men hesa ferð skrædnaði orduliga. Eftir fyrra umfarið var málleyst, men FCM fekk mál beinanvegin eftir steðgin, og teir vunnu 5–0.

Viborg og AB vóru undan vikuskiftinum aftast, og tað eru tey framvegis. Innanhýsis uppgerðin í Gladsaxe endaði 1–1. Lagið í AB er ikki gott, meðan teir í Viborg halda seg vera á røttu kósini.

Burtursæð frá FCK, sum er í flokki fyri seg, eru øll hini ellivu feløgini ikki longri enn sjey stig frá botnplássinum.

# Todi var aftur í rætta essinum

**Tá ið hann endiliga fekk møguleikan, varð føroyski álopsspælarin valdur at vera dagsins maður hjá FCK**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Eins deyð er annars breyð. Meiri enn í so mongum øðrum førum hóskar orðatakið seg til tilveruna hjá fótbóltsspælarum. Inntil leygardagin var spurningurin, um Todi Jónsson skuldi sita á áskoðaraplássunum, ella um hann skuldi sita á beinkinum, tá ið Farum sunnudagin skuldi vitja í Parkini. Men leygardagin varð svenski álopsmaðurin hjá FCK, Jörgen Pettersson, smáskaddur í lærinum, og so fekk Todi Jónsson møguleikan ímillum teir fyrstu ellivu.

– Tað var gott, at tað gekst so væl, tá ið møguleikin var har, eftir at eg ikki hevði verið við í seks dystum, segði Todi Jónsson eftir dystarenda, og tað er væl skiljandi, at Todi var fegin. Einki er so ørkymlandi hjá fótbóltsspælarum sum at sita á beinkinum, og hjá Toda kom tað eyka væl við at sleppa framat og spæla væl, nú hann samráðist við FCK um nýggjan sáttmála.

Stutt undan dystarenda varð Todi Jónsson skiftur út við verjuspælaran Boro Zivkovic, og bróðurparturin av teimum 17.288 áskoðarunum góvu til kennar, at teir vóru stak væl nøgdir við avrikið hjá Toda, sum bæði viðhaldsfólkini hjá FCK og hyggjararnir hjá TV3 mettu at vera tað besta av øllum. Todi Jónsson varð kosin at vera dagsins maður í Parkini.

– Um Jörgen Petterssson ikki hevði havt verið skaddur, so hevði eg ikki havt fingið møguleikan at spæla, staðfesti Todi Jónsson, og vit kunnu bara taka afturíaftur orðatakið, at eins deyð er annars breyð.

Komandi sunnudag skal FCK spæla á útivølli ímóti botnliðnum AB. Spurningurin er so, umTodi Jónsson fer at fáa møguleikan. Ímóti Farum var Sibusisu Zuma, sum í síðstu viku skrivaði undir nýggjan trý ára sáttmala við FCK, á miðvøllinum í høgru. Toppskjúttin í superliguni, Peter Møller, var í álopinum. Hann varð smáskaddur, tá ið hann stutt undan hvíldini fór av vøllinum. Tá varð Zuma fluttur í álopið, men myrki suðurafrikanarin var ikki serliga væl upplagdur sunnudagin.

### Mál og upplegg

Orsøkin til at Todi Jónsson varð kosin dagsins maður var, at hann bæði skoraði og legði upp til tvey av málunum í 4–0 sigrinum ímóti Farum.

Tá ið Peter Møller úr stuttari fjarstøðu skoraði til 1–0, var tað eftir fínt innlegg úr vinstru frá Toda Jónsson. Tá vóru átta minuttir farnir, og fimm minuttir seinni skoraði Todi fyri aðru ferð í hesum kappingarárinum. Úr høgru sneiddi hann framvið trimum mótstøðumonnum, áðrenn hann úr átjan metra fjarstøðu smekkaði flatt og dygst innanfyri stólparótina.

FCK hevði alt spælið, og tá ið verjuspælarin Bo Svensson eftir horna økti til 3–0, átti Todi Jónsson næstsíðsta fótin á bóltinum. Innskifti Christian Lønstrup stútaði dygst undan steðginum til 4–0 eftir innlegg úr vinstru, og so komu ikki fleiri mál.

Farum misti tíðliga í 2. hálvleiki – av órøttum – ein verjuspælara, men FCK megnaði ikki at toga seg upp. Ferðin fór niður, og møguleikarnir vóru ikki so nógvir í 2. hálvleiki. Eftir kiksaða rangstøðufellu fekk Todi Jónsson fínan møguleika stutt frammanundan, at hann varð skiftur út, men skotroyndin við høgra beini miseydnaðist.

Eftir dystin staðfesti FCK venjarin, Hans Backe, at í løtuni eru FCK spælararnir einastu mótstøðumenninir, sum teir hava í superliguni. Um teir megna at varðveita støðið, sum teir hava víst síðstu ferðirnar, so er lítið at ivast í, at teir fara at vinna DM, men venjarin vil ikki tosa um DM. Hans Backe metti, at verjuspælarin, Martin Albrechtsen, sum bara er 22 ára gamalur, er so mikið dugnaligur, at hann longu er búgvin til størri uppgávur. Harvið sipar venjarin ivaleyst til, at FCK hevur ætlanir um at selja unga mannin og harvið heilt skjótt at vinna nógvar pengar fyri hann.

Hjá Martin Albrechtsen var tað døkkur plettur á sannførandi avrikið, at hann í síðstu løtu fekk annað gula kortið og harvið varð útvístur. Tað hevur við sær, at hann verður leikbannaður, tá FCK sunnudagin fer at vitja á gamla heimavøllinum hjá honum í Gladsaxe.



*Todi Jónsson var rættiliga í essinum, tá FCK økti um leiðsluna í superliguni, og spurningurin er so, hvørt hann kann rokna við afturvali til komandi uppgávuna, tá FCK skal til Gladsaxe at spæla ímóti AB*



KÍF-VÍF 30-25 (13-12):

# So kom KÍF ígongd

**Kollfirðingar fingu fyrstu stigini á árinum, tá teir uppiborið vunnu á tvífaldu føroyameistarunum úr Vestmanna**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Longu undan dystinum vóru greið tekin um, at KÍF hevði møguleika at gera nakað álvarsligt við VÍF. Kollfirðingar høvdu móti Kyndli fyuri viku síðani tríggjar nýggjar útlendskar leikarar í hópinum, og hesir sýndu tá, at teir so avgjørt verða góður fongur hjá liðnum.

Hartil hevði VÍF í sínum lag fýra landsliðsleikarar við í teimum trimum dystunum á júst lidnu grønlandsferðini, og hartil er Sámal Joensen framvegis skaddur.

### Gekk javnt á

Um hetta var nøkur umbering, ber illa til at siga, men undir øllum umstøðum stóð skjótt greitt, at VÍF so avgjørt ikki fekk nakað sum helst forerandi í dystinum.

Kollfirðingarnir vóru tendraðir frá fyrsta bríksli. Damir byrjaði alt fyri eitt at prógva, at hann helst ætlar sær toppskjútta-heitið í hesum kappingarárinum, og umframt málini, sum hetta kastar av sær, so tykist tað eisini hava givið hinum á liðnum betri róð yvir sítt spæl.

Vestmenningar svaraðu tó alla tíðina aftur, men tó at teir fleiri ferðir komu til skot, so var Óla Kristian í nógvum førum fyri teimum, og yvir høvur tykist hann hava ætlanir um at prógva, at nýggi útlendski málverjin so avgjørt ikki bara skal koma á plássið uttan víðari. Heldur ikki hóast hann hevur status sum fyrrverandi U-21 heimsmeistari.

### Ídni gav úrslit

Seinna hálvleik mundi dystargongdin vera á leið hin sama. Kollfirðingarnir hildu alla tíðina nevið framman fyri mótstøðuna, men hóast ferðamøðin mundi vera størri hjá vestmenningunum, so fylgdu teir alla tíðina við. Ella sagt øðrvísi, so fylgdi Ingi Olsen alla tíðina við. Sum so ofta fyrr, so tók hann tungu árbyrgdina á seg, tá tað stóð á, og tað var eisini um reppið, at hetta var nóg mikið.

Men tað var tað ikki. Fyrst og fremst tí kollfirðingarnir nú stríddust sum úlvar á skóg. Teir høvdu sigurin í eygsjón, og uttan náði av nøkrum sum helst slag korydu teir á VÍF. Umframt stórspælið frá Damir fór hin útlendski útleikarin, Mirko Milinkovic, nú at gera um seg. Enn er hann ikki heilt innspædlur á liðnum, men sum hann sletti bóltin bæði út á vengirnar og inn á strikuna skulu viðleikararnir bert læra at skilja mongu duldu sendingar hansara, áðrenn kollfirðingar fara at fáa fulla nyttu burturúr.

Og at enda, so gav ídna og stríðsfúsna KÍF avrikið eisini úrslit. Vestmenningar megnaðu snøgt sagt ikki at fylgja við í longdini. Óla Kristian gjørdist bara betri og betri fyri hvørt minutt í seinna hálvleiki, og hava vestmenningarnir havt marruna av honum mánanáttina, so er einki forgjørt í tí. Og mest sum hvørja ferð ein bjarging varð framd, vórðu vestmenningar revsaðir fyri mistakið, soleiðis at heimasigurin gjørdist alt meira sjónligur. Og tá seinasta bríkslið ljóðaði, so var seinasti ivin langt síðani burturbeindur. KÍF hevði ikki bert vunnið fyrsta sigurin á árinum. Teir høvdu bast tvífaldu meistarunum úr VÍF, og kanska enn týdningarmiklari, so høvdu teir prógvað fyri sær sjálvum, at teir eisini skulu roknast uppí, tá gitingar um úrslit verða gjørdar framyvir.



*Leingi var Ingi Olsen einsamallur um at stríðast móti væl leikandi kollfirðingunum, men í longdini megnaði heldur ikki hann at standa ímóti áhaldandi trýstinum frá KÍF*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**KÍF-VÍF 30-25 (13-12)**

Málskjúttar

KÍF: Damir Oros 14, Rógvi Weihe 4, Vagnur Johannesen 3, Mirko Milinkovic 3, Kristian Madsen 2, Regin Petersen 2, Petur Martin Poulsen 2

VÍF: Ingi Olsen 10, John Zachariasen 5, Piti Negru 3, Ólavur Brimnes 3, Áki Olsen 2, Agnar Joensen 1, Áki G. Olsen 1

Útvísingar: KÍF 5, VÍF 1

Diskvalifikatión: KÍF 1 (3X2 minuttir)

Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen

# Vejle gjørdi eitt lop

**Nú eru fýra stig fram til næstfremsta plássið, sum felagið hjá Atla Gregersen situr á**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Christian Høgni Jacobsen var sunnudagin einasta føroyska íslettið í næstbestu donsku deildini. Randers Freja var sera sannførandi, tá ið teir sendu botnliðið úr HIK aftur til Keypmannahavnar við 4–0 tapi. Men Atli Gregersen var ikki á liðnum hjá Randers Freja, sum er næstfremst og harvið á uppflytingarplássi.

Johan B. Hansen og Horsens skuldu ikki spæla fyrrenn í gjárkvøldið, tá ið teir skuldu fáa vitjan av FC Aarhus.

Vejle var í Odense og vitjaði B1909. Í fimmti, seksti og sjeyti árunum vóru hesi bæði feløgini við til at mynda toppin í donskum fótbólti, og tað vóru altíð nógvir áskoðarar á Odense stadion, tá hesi liðini hittust. Nú eru feløgini í næstbestu deildini, tað verður ikki spælt á fínasta vøllinum í fjónska høvuðsstaðnum, og áhugin millum áskoðararnar er ikki so stórur, sum hann onkuntíð hevur verið.

Christian Høgni Jacobsen var allar 90 minuttirnar á vongverjanum í høgru hjá Vejle, sum vann 3–1. Men teir í Vejle fingu ein skelk, áðrenn teir fingu høvdið fyri seg. Bara 24 sekund vóru farin, tá B1909 legði seg á odda. Í 13. minutti javnaði Peter Degn eftir hornaspark. Vejle hevði bóltin nógv størsta partin av tíðini, teir høvdu nógvar málmøguleikar, men teir fingu ikki mál aftur, fyrrenn tað restaðu 20 og seks minuttir. Málskjúttar vóru Chris Sørensen og Jerry Brown.

Sigurin í Odense bar við sær, at Vejle lyfti seg fram á fimta plássið. Tvey tey bestu flyta upp í superliguna.

Herfølge er framvegis sannførandi oddalið. Hesa ferð høvdu teir vitjan av hinum árstalsfelagnum í Odense, B1913, og Herfølge vann 4–0.

Frem kiksaði næstsíðst á heimavølli ímóti Randers Freja. Leygardagin var eingin slingur í valsinum. Valby liðið var á Tingbjerg stadion, og teir vundu burturúr Brønshøj, sum legði rygg til 5–0 tap.

Skjold ger framvegis danska fótbóltsheimin ovfarnan. Hesa ferð var uppgávan ikki so torfør. Felagið á Eysturbrúgv vitjaði í Hvidovre, har skilið er vánaligt. Gestirnir vunnu 3–1, og Hvidovre tykist vera á veg niður úr næstbestu deildini.

Ølstykke legði bragdliga fyri, eftir at teir í summar við Henrik Larsen sum venjara fluttu upp í næstbestu deildina. Benny Johansen, sum í vár næstan varð føroyskur landsliðsvenjari, er venjari, og tað hevur ikki hilnast væl síðstu ferðirnar. Hesa ferð taptu teir á heimavølli 2–0 ímóti Fredericia.

Í fimtanda umfarinum skal Vejle ikki spæla fyrrenn mánadagin. Tá fara teir at fáa vitjan av Randers Freja.

Tað hevur leingi ljóðað, at Vejle og Horsens ætlaðu at leggja bestu liðini saman, soleiðis at vánirnar at sleppa upp í part í superliguni skuldu gerast størri. Nú er tað greitt, at í hesum umfarinum verður einki burturúr ætlanunum um samanlegging. Eingin vil vera høvuðsstuðul fyri ta upphæddina, sum feløgini hava mett er neyðug.

# Vit hava eitt gott lið

**Einki er at ivast í, at útlendsku leikararnir hava havt sína ávirkan á KÍF, men venjarin heldur tó, at liðið er annað og meira enn tað**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sigurin hjá KÍF á VÍF var hin fyrsti hjá liðnum í hesum kappingarárinum, og hann júst skuldi koma móti vestmenningunum, man uttan iva kennast fløvandi hjá teimum reyðu.

Ein av broytingunum á liðnum nú í seinastuni er sjálvandi, at liðið nú telir tríggjar sera góðar útlendskar leikarar, men venjarin, Kári Durhuus, vil ikki einvíst geva hesum æruna fyri vendini, sum nú tykist vera íkomin.

- Tað sigur seg sjálvt, at hetta eru góðir leikarar, og serstakliga er tað gott, at vit nú hava fingið meira skotstyrki. Har hevur Eddie verið alt ov einsamallur hjá okkum, og nú hóttanin eisini kemur aðra staðni frá, gevur tað hinum leikarunum betri pláss at spæla á, heldur hann.

Og Kári ivast heldur ikki í, at KÍF í løtuni hevur eitt lið, sum er ført fyri at gagnnýta tað pláss, sum nýggju leikararnir hava givið.

- Eg havi alla tíðina sagt, at vit hava nógvar góðar leikarar. Hondbóltsliga standa vit okkum sera væl, men sum sagt, so hevur skotstyrkin resta. Nøkur tekin vóru at síggja móti Kyndli seinast, men ta ferðina kendu vit ikki hvønn annan nóg væl. Í dag var nógv lættari at vera á beinkinum í so máta, tí betri tú kennir leikararnar, lættari hevur tú við at taka røttu avgerðirnar.

- Og so skalt heldur ikki gloymast, at vit hava tveir sera góðar málverjarar, so alt í alt haldi eg, at vit hava eitt gott lið í ár, og so er spurningurin bara, hvussu langt tað røkkur, heldur KÍF-venjarin at enda.



*- Eg havi alla tíðina sagt, at vit hava nógvar góðar leikarar, men okkum hevur vantað skotstyrki, heldur Kári Durhuus*

*Mynd: Álvur Haraldsen*